Starvslýsing

Stuðulstænastan

# Stuðulstænastan søkir eftir einum avloysara til 4 brúkarar í Norðurstreymoy

Stuðulstænastan søkir eftir einum avloysara til 4 brúkarar í Norðstreymoy, fyribils til 15. mars 2008, við møguleika fyri leingjan.

**Arbeiðsuppgávurmar** eru at stuðla brúkarunum í gerandisligum uppgávum. At fara við teimum til ymisk tiltøk, skipað sum óskipað og soleiðis stuðla teimum í at hava ein innihaldsríkan gerandisdag.

**Arbeiðstíðin** er 22 tímar um vikuna tilsamans. Tann, sum verður settur, kemur at vera partur av einum toymi, sum umfatar stuðlar í Norðurstreymoy.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar, ið hava útbúging sum pedagogar, heilsuhjálparar og starvsfólk við líknandi útbúgving hava fyrimun til starvið.

Hvat viðvíkur øðrum útbúgvingum, sum primært ikki eru ætlaðar til arbeiði innan almanna- og heilsuøkið, verður víst til hjálparfólkasáttmálan hjá pedagogfelagum.

**Lønar- og setunartreytir**
Talan er um størv innan Nærverkið og roknast má við, at arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld-, og vikuskiftisarbeiði.

Løn sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið frá sosialráðgeva Karin á Heygum á tlf: 360000.

**Umsókn**
Umsókn saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

Nærverkið
Stuðulstænastan
Argjavegur 26
F0–160 Argir

**Umsóknarfreist: 25. januar 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Trivnaðartænastan

# Varaleiðari til Fugloyarveg 9

Søkt verður eftir varaleiðara til sambýlini Fugloyarveg 9 – Grønlandsveg 59- og í Svanga 24.

Sambýlini Fugloyarvegur 9 eru tríggjar eindir, ið eru í sama umhvørvið. Her búgva íalt 17 fólk, ið hava brúk fyri hjálp at skipa sítt heim til eitt gott og trygt stað at búgva.

Starvfólkini eru 15 íalt og rokera ímillum húsini í eini fastlagdari arbeiðsætlan. Uppgávurnar hjá starvsfólkunum eru at stuðla og vegleiða búfólkunum í at klára seg í egnum heimi og at stimbra til avbjóðingar í tí vanliga lívinum.

Varaleiðarin arbeiðir í normering og hevur haraftrat uppgávur í umsitingini av stovninum ið eru fastlagdar saman við leiðaranum

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumannasettur, kann setanin halda fram og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran Eydnu Nicolajsen á telefon 215424

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Sambýlið
Fugloyarvegur 9
100 Tórshavn
Stílað: Eydna Nicolajsen

**Umsóknarfreist: 25. januar. 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

RÁS
...títt radio
Vit eru har tað hendir...